at fólkatingsmaðurin á Glyvrum, Tórbjørn Jacobsen, er favorittur, men hann fær neyvan stóran stuðul úr Fuglafirði.

Sjálvstýrisflokkurin stríðist við tinggáttina. Um hann røkkur henni, bendir nógv á, at fyrsti maðurin fer at verða valdur í Eysturoy. Sámal Petur í Grund kappast við Kára P. Højgaard, sum hevur verið avloysari í tinginum, og so er spurningurin, hvussu tað verður, nú Lasse Klein aftur er á sjálvstýrislistanum.

Miðflokkurin fær bara mann í Eysturoy, um flokkurin í øllum landinum fær nóg mikið av atkvøðum til tveir tingmenn. Eingin ivi man vera um, at Tordur Niclasen fer at fáa flest atkvøður hjá Miðflokkinum í Eysturoy. Um tað verður nóg mikið til eykavaldan sess í løgtinginum fæst at vita týsdagin.

1966 (A, B, C og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	587
Poul Petersen	240
Sambandsflokkurin	1.151
Johan Poulsen	372
Javnaðarflokkurin	822
Jacob Fr. Øregaard	376
Sjálvstýrisflokkurin	97
Tjóðveldisflokkurin	771
Frederik Hansen	217
Framburðsflokkurin	54
	3.482

1970 (A, B, C og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	653
Jógvan Sundstein	201
Sambandsflokkurin	1.130
Jógvan I. Olsen	262
Jóhannes Martin Olsen (eyka)	157
Javnaðarflokkurin	695
Jacob Fr. Øregaard	320
Sjálvstýrisflokkurin	246
Tjóðveldisflokkurin	789
Signar Hansen	206
Framburðrsflokkurin	62
	3.575

1974 (A, B, C og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	598
Jógvan Sundstein	329
Sambandsflokkurin	1.127
Jógvan Ingvard Olsen	284
Jóhannes Martin Olsen (eyka)	279
Javnaðarflokkurin	721
Jacob Fr. Øregaard	385
Sjálvstýrisflokkurin	365
Tjóðveldisflokkurin	1.070
Signar Hansen	310
Framburðsflokkurin	58
	3.939

1978 (A, B (2), C og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	692
Edmund í Garði	250
Sambandsflokkurin	1.578
Jógvan Ingvard Olsen	447
Jóhannes Martin Olsen	273
Javnaðarflokkurin	617
Jørgen Thomsen	139
Sjálvstýrisflokkurin	446
Tjóðveldisflokkurin	994
Signar Hansen	324
Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin (eyka)	361
Adolf Hansen	198
	4.688

1980 (A, B(2), C og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	823
Olaf Olsen	256
Sambandsflokkurin	1.455
Jógvan Ingvard Olsen	384
Jóhannes Martin Olsen	259
Javnaðarflokkurin	690
Jørgen Thomsen	236
Sjálvstýrisflokkurin (eyka)	548
Frederik Olsen	244
Tjóðveldisflokkurin	878
Petur Reinert	322
Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin (eyka)	418
Adolf Hansen	219
	4.812

1984 (A, B (2), C og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	911
Olaf Olsen	294
Sambandsflokkurin	1.508
Jógvan Ingvard Olsen	362
Jóhannes Martin Olsen	254
Javnaðarflokkurin	697
Jørgen Thomsen	252
Sjálvstýrisflokkurin	661
Tjóðveldisflokkurin	1.112
Signar Hansen	390
Kristiligi Fólkaflokkurin (eyka)	415
Adolf Hansen	117
	5.304

1988 (A, B(2), C og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	1.130
Olaf Olsen	394
Sambandsflokkurin	1.687
Jógvan Ingvard Olsen	377
Edmund Joensen	308
Javnaðarflokkurin	925
Jørgen Thomsen	293
Sjálvstýrisflokkurin (eyka)	754
Lasse Klein	402
Tjóðveldisflokkurin	1.114
Signar Hansen	421
Kristiligi Fólkaflokkurin	305
Framsóknarflokkurin	252
	6.167

1990 (A, B(2), C, og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	1.115
Olaf Olsen	253
Sambandsflokkurin	1.678
Edmund Joensen	501
Jógvan Ingvard Olsen	399
Javnaðarflokkurin	1.124
Jørgen Thomsen	272
Sjálvstýrisflokkurin (eyka)	705
Lasse Klein	364
Tjóðveldisflokkurin	966
Signar Hansen	
Kristiligi Fólkaflokkurin (eyka)	463
Tordur Niclasen	282
Sosialistiski loysingarflokkurin	70
	6.121

1994 (A, B(2), E, og G umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	814
Kjartan Joensen	263
Sambandsflokkurin	1.543
Edmund Joensen	327
Jógvan Ingvard Olsen	267
Javnaðarflokkurin	509
Sjálvstýrisflokkurin	319
Tjóðveldisflokkurin	624
Signar á Brúnni	184
Kristiligi Fóilkaflokkurin (eyka)	475
Lasse Klein	310
Verkamannafylkingin	611
Óli Jacobsen	447
Miðflokkurin (eyka)	475
Tordur Niclasen	313
Føroyski flokkurin	118
Frælsisfylkingin	73
	5.530

1998 (A, B(2), C, og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	1.085
Jógvan á Lakjuni	383
Sambandsflokkurin	1.533
Alfred Olsen	388
Edmund Joensen	326
Javnaðarflokkurin	914
Dan Reinert Petersen	194
Sjálvstýrisflokkurin (eyka)	708
Sámal Petur í Grund	533
Tjóðveldisflokkurin	1.177
Signar á Brúnni	286
Miðflokkurin	352
Verkamannafylkingin	42
	6.055

Hvør einstøk atkvøða vigar meiri enn aðra staðni

Ofta hevur munurin millum flokkin, sum hevur fingið seinna mannin, og triðja flokkin í røðini bara verið nakrar heilt fáar atkvøður, og fleiri ferðir hava sandoyar tingmenn, sum hava sitið í landsstýrinum mist tingsessin á næsta valinum

SANDOY
Jóannes Hansen

Onga staðni plaga løgtingsvalinum at vera tættari enn í Sandoyar valdømi. Minsta valdømið í landinum eigur tveir umdømisvaldar tingmenn. Sammett við fólkatalið eru hetta væl bíligastu tingmenninir. Teir báðir sandoyartingmenninir hava nú undan valinum í miðal 746 sandoyingar og skúvoyingar aftanfyri seg. Næstlægsta fólkatalið fyri hvønn tingmannin er í Norðstreymi, har 1.233 íbúgvar eru upp á hvønn av teimum trimum tingmonnunum.

Tað plagar at verða tikið til, at tað er rættuliga avgerandi fyri samlaða úrslitið av valinum, hvør fær umdømisvaldu menninar í smáu valdømunum. Hetta hevur serliga verið galdandi síðani 1978. Á tí valinum var talið á umdømisvaldum tingmonnum hækkað úr 20 og upp í 27. Samstundis varð talið á eykavaldum lækkað. Frammanundan var hámarkstalið tíggju. Síðani hevur tað verið fimm.

Tá eitt valdømi upp á seg er so væl umboðað við umdømisvaldum tingmonnum, er sannlíkið mest sum einki fyri, at eykavaldir tingmenn skulu fella valdøminum í lut. Eingin eykavaldur tingmaður er higartil valdur í Sandoyar valdømi. Tað er møguleiki fyri tí, men so skal tað sita ógvuliga væl hjá sandoyingum.

Síðani floksbýtið í 1906 hevur Sambandsflokkurin ongantíð fingið mann valdan í Sandoyar valdømi. Sjálvstýrisflokkurin var einaráðandi, inntil Javnaðarflokkurin vann annan mannin í 1936. Í 1940 fekk nýstovnaði Fólkaflokkurin mannin frá Sjálvstýrisflokkinum, og síðani Tjóðveldisflokkurin fekk mannin frá Fólkaflokkinum í 1954, hava tað verið teir tríggir – Fólkaflokkurin, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin – sum hava togast um teir báðar sessirnar.

Tøttu valini

Síðani 1966 hevur tað fimm ferðir verið soleiðis, at munurin millum næstfremsta flokkin, sum hevur fingið seinna mannin, og triði fremsta flokkin, sum ikki hevur fingið mann, hevur verið heilt lítil. Tættast var tað í 1980. Tá vóru bara tvær atkvøður millum Javnaðarflokkin, sum fekk næsta mannin, og Tjóðveldisflokkin, sum ikki fekk umboðan.

Tvey ár frammanundan – í 1978 – var Javnaðarflokkurin við sviðið soð. Ta ferðina misti hann mannin, sum hann hevði havt í fleiri enn fjøruti ár. Munurin fram til Fólkaflokkin á næstfremsta plássinum var tríggjar atkvøður. Í 1974 var munurin millum Tjóðveldisflokkin, sum tók mandatið frá Fólkaflokkinum og Demmusi Hentze, tíggju atkvøður. Í 1984 var munurin frá Javnaðarflokkinum og aftur til fólkaflokkin fimm atkvøður, og tá Javnaðarflokkurin í 1998 fyri aðru ferð seinastu seksti árini misti mannin, var frástøðan upp til Tjóðveldisflokkin ellivu atkvøður.

Við omanfyri standandi veruleika í huga er einki at undrast á, at tað verður fylgt væl við í Sandoyar valdømi, og at valluttøkan er millum tær hægstu. Um onkur flytir úr valdøminum, ella um ein familja ger av at skifta frá einum flokki og til ein annan, so kann tað meiri enn so hava við sær, at mandatið flytir frá einum flokki og til ein annan, og at fyritreytirnar at skipa samgongu harvið verða broyttar!

Stórar broytingar viðhvørt

Tað kemur onkuntið fyri, at broytingarnar í atkvøðutølunum hjá flokkunum eru so lítlar frá vali og til val, at tað kennist sum, at tað eru nett tey somu, sum hava endurtikið avkvøðuna frá undanfarna valinum. Eitt dømi um hetta eru valini hjá Fólkaflokkinum í 1984 og í 1988. Báðu ferðirnar fekk flokkurin 316 atkvøður. Eitt annað dømi eru valini hjá Javnaðarflokkinum í 1970 og í 1974, tá tølini vóru ávikavíst 280 og 284.

Men tað hevur ikki altíð verið so støðugt. Størsta atkvøðulopið hesi árini var tað hjá Javnaðarflokkinum frá 1988, tá hann hevði 283 atkvøður, og til besta valið hjá honum í Føroyum. Flokkurin fekk í 1990 tíggju umboð, og í Sandoyar valdømi var flokkurin størstur við 396 atkvøður. Eftir tað var Javnaðarflokkurin fyri størsta atkvøðumissinum, sum nakar flokkur nakrantíð hevur verið fyri í Sandoyar valdømi. Teir varðveittu umboðanina, men atkvøðutalið fór úr 396 og niður í 230!

Eftir at Tjóðveldisflokkurin ikki hevði havt umboðan fýra val á rað, vann hann mannin á valinum í 1998. Tá fór atkvøðutalið úr 200 og upp í 284, og Páll á Reynatúgvu varð valdur.

Tá Fólkaflokkurin í 1978 fekk seinna mannin, hevði hann 227 atkvøður. Í 1980 fór atkvøðutalið upp í 251, men teir mistu mannin, tí teir fingu tvær atkvøður færri enn Javnaðarflokkurin. Í 1984 fór atkvøðutalið hjá Fólkaflokkinum upp um trý hundrað, og síðani hevur Fólkaflokkurin átt annan mannin.

Ódrúgvir landsstýrismenn

J. P. Davidsen, sum var limur í fyrsta landsstýrinum, eftir at heimastýrisskipanin var komin í 1948, umboðaði Javnaðarflokkin frá 1936 og inntil 1970. Hetta er met fyri Sandoyar valdømi, og landsstýrissessurin skalaði ikki framtíðina hjá javnaðartingmanninum. Hinir løgtingsmenninir hjá Javnaðarflokkinum hava verið Tórolvur Mohr Olsen og Jógvan Adolf Johannesen. Á listanum til hetta valið er eingin, sum áður hevur verið í løgtinginum.

Antines Sørensen í Húsavík umboðaði Fólkaflokkin frá 1940 og inntil 1954. Húsavík hevur verið fólkafloksbygd, síðani flokkurin varð stovnaður, men teir hava ikki átt mannin í Húsavík, síðani Antines Sørensen fall. Demmus Hentze, sum er ættaður av Sandi, men búsitandi í Havnini, varð valdur í 1966. Tá fekk hann 194 persónligar atkvøður, og tað er framvegis met í persónligum atkvøðum í Sandoyar valdømi.

Demmus Hentze fall í 1974, men hann kom innaftur í 1978. Í 1980 – eftir at Demmus Hentze hevði verið landsstýrismaður í seks ár – misti Fólkaflokkurin mannin í Sandoyar valdømi. Eyðun Viderø á Sandi vann sessin í 1984, men í 1988 misti hann sessin til partamannin John Petersen í Skopun. Hann hevur verið afturvaldur hvørja ferð, og í 1994 fekk hann 192 persónligar atkvøður ella tvær færri enn Demmus Hentze fekk í 1966. John Petersen var landsstýrismaður frá 1991 og til 1993 og frá 1996 og til 2000. Hann er ikki uppi í

politikki longur og er tískil ikki á fólkaflokslistanum hesa ferð.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Erlendur Patursson, varð valdur á ting fyri Sandoyar valdømi í 1954, og hann varð afturvaldur í 1958 og í 1962. Eftir at hann hevði verið landsstýrismaður í figgjarmálum í sjálvstýrislandsstýrinum fall hann á valinum í 1966. Síðani flutti Erlendur Patursson í Suðurstreymoyar valdømi, har hann varð valdur fyrstu ferð í 1970.

Í 1974 varð Heðin M. Klein, sum tá var lærari á Sandi, valdur fyri Tjóðveldisflokkin, og hann varð afturvaldur í 1978. Í 1980 vann Hans Marius Joensen í Skopun tjóðveldissessin. Tá hevði Heðin M. Klein verið landsstýrismaður í tvey ár, og hann var tískil triði Sandoyar tingmaðurin, sum misti sessin á valinum, eftir at hann hevði verið landsstýrismaður. Tjóðveldisflokkurin misti mannin í 1984, og so var øskukalt hjá tjóðveldinum í Sandoyar valdømi inntil í 1998.

Omanfyri hava vit fingið staðfest, at fýra valdir løgtingsmenn í Sandoyar valdømi hava mist politiska sessin, meðan teir hava verið landsstýrismenn. So eru sandoyingar ávaraðir, um teimum eftir valið skuldi staðið landsstýrissessur í boði!

Fleiri spenningar

Sum omanfyri nevnt, so verður valið í Sandoyar valdømi spennandi av fleiri orsøkum. Tann fyrsta er, hvørjir flokkar fara at fáa ódýrastu umdømisvaldu umboðini. Ein onnur er, hvør fer at verða valdur. Javnaðarflokkurin hevur, síðani hann fyrstu ferð vann umboð í valdøminum, mist mannin tvær ferðir. Báðu ferðirnar hevur tað eydnast at vinna hann aftur á næsta valinum. Týsdagurin fer at vísa, um tað eisini fer at eydnast triðju ferð.

John Petersen hevur á fýra teimum seinastu valunum vunnið Fólkaflokkinum tingsessin rættuliga sannførandi. Hann er ikki á listanum hesa ferð. Spurningurin er so, um Eyðun Viderø og hini valevnini fara at megna at lyfta flokkin í hvussu so er fram á næstfremsta plássið. Tað er neyvan nakar ivi, at um Tjóðveldisflokkurin fer at endurvinna sessin, so verður tað borgarstjórin á Sandi, sum verður valdur.

Tað er einki at liggja omaná, at tað hevur verið stór kapping millum stóru bygdirnar í valdøminum um at ogna sær tingsessirnar. Hesa ferð er størsti spenningurin í so máta kanska tann á javnaðarlistanum. Spurningurin er eitt nú, um borgarstjórn í Skopun, Gerhard Lognberg, skal gera ferðalag í løgtingið við borgarstjóran á Sandi, ella um tveir sandoyingar ella kanska tveir skopuningar vinna sær tingsess.

1966 (A og C umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	252
Demmus Hentze	194
Sambandsflokkurin	88
Javnaðarflokkurin	260
J. P. Davidsen	117
Sjálvstýrisflokkurin	72
Tjóðveldisflokkurin	194
Framburðsflokkurin	26
	892

1970 (A og C umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	219
Demmus Hentze	176
Sambandsflokkurin	93
Javnaðarflokkurin	280
Tórolvur Mohr Olsen	105
Sjálvstýrisflokkurin	47
Tjóðveldisflokkurin	184
Framburðsflokkurin	52
	875

1974 (C og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	218
Sambandsflokkurin	86
Javnaðarflokkurin	284
Tórolvur Mohr Olsen	140
Sjálvstýrisflokkurin	40
Tjóðveldisflokkurin	228
Heðin M. Klein	93
Framburðsflokkurin	53
	909

1978 (A og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	227
Demmus Hentze	135
Sambandsflokkurin	169
Javnaðarflokkurin	224
Sjálvstýrisflokkurin	48
Tjóðveldisflokkurin	239
Heðin M. Klein	108
Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin	50
	957

1980 (C og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	251
Sambandsflokkurin	139
Javnaðarflokkurin	253
Tórolvur Mohr Olsen	142
Sjálvstýrisflokkurin	37
Tjóðveldisflokkurin	260
Hans Marius Joensen	133
Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin	42
	982

1984 (A og C umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	301
Eyðun Viderø	145
Sambandsflokkurin	114
Javnaðarflokkurin	291
Tórolvur Mohr Olsen	166
Sjálvstýrisflokkurin	43
Tjóðveldisflokkurin	286
Kristiligi Fólkaflokkurin	17
	1.052

1988 (A og C umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	316
John Petersen	165
Sambandsflokkurin	124
Javnaðarflokkurin	283
Jógvan Adolf Johannesen	83
Sjálvstýrisflokkurin	45
Tjóðveldisflokkurin	260
Kristiligi Fólkaflokkurin	33
Framsóknarflokkurin	-
	1.061

1990 (A og C umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	316
John Petersen	173
Sambandsflokkurin	76
Javnaðarflokkurin	396
Jógvan Adolf Johannesen	191
Sjálvstýrisflokkurin	39
Tjóðveldisflokkurin	212
Kristiligi Fólkaflokkurin	21
Sosialistiski Loysingarflokkurin	-
	1.060

1994 (A og C umdømisvaldan)	
Fólkaflokkurin	300
John Petersen	192
Sambandsflokkurin	113
Javnaðarflokkurin	230
Jógvan Adolf Johannesen	115
Sjálvstýrisflokkurin	10
Tjóðveldisflokkurin	200
Kristiligi Fólkaflokkurin	18
Miðflokkurin	56
Verkamannafylkingin	-
Føroyski Flokkurin	4
Frælsisfylkingin	-
	931

1998 (A og E umdømisvaldar)	
Fólkaflokkurin	289
John Petersen	131
Sambandsflokkurin	95
Javnaðarflokkurin	273
Sjálvstýrisflokkurin	15
Tjóðveldisflokkurin	284
Páll á Reynatúgvu	106
Kristiligi Fólkaflokkurin	-
Miðflokkurin	16
Verkamannafylkingin	-
	972

Sosialurin kemur eisini út Dýra Biðidag

Sosialurin kemur eisini út Dýra Biðidag, hóast Postverkið hevur stongt

ÚTBERING
Eirikur Lindenskov

Tey, sum halda bløðini, verða ikki við svíðusoð, hóast eingin postur verður borin út í dag, flaggdagin og í morgin, Dýra Biðidag. Haldarar við privatadressu í høvuðsstaðarøkinum (tey, sum fáa blaðið borið hvørt kvøld) fáa blaðið borið út sum vanligt í kvøld, mikukvøld, og í annaðkvøld.

Haldarar við postboksadressu fingu hósdagsblaðið í boks sum vanligt í gjárkvøldið, meðan blaðið fyri Dýra Biðidag kemur ikki í boksina fyrr enn leygardagin.

Av tí at postverkið ikki ber post út í morgun, hósmorgunin, fáa haldara við privatadressu uttan fyri høvuðsstaðarøkið (tey sum fáa blaðið borið fríggjakvøld) bæði blaðið fyri flaggdagin og fyri Dýra Biðidag borin út í kvøld við blaðboðunum hjá Prentmiðstøðini.

Haldarar við postboksadressu á bygd fáa hósdagsblaðið í boks sum vanligt kvøldið fyri, meðan blaðið fyri Dýra Biðidag helst ikki kemur í boks fyrr enn mánamorgunin.

Nýggj ÚSUN-kunngerð

TÍÐINDASKRIV

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur ásett at nýggj kunngerð verður galdandi frá 1. august 2002 – kunngerð nr. 51 um útbúgvingarstuðul til lesandi uttan fyri Norðurlond (ÚSUN-skipanin).

ÚSUN-skipanin varð sett í verk á fyrsta sinni í 1990 sum royndarskipan, og í 1997 kom kunngerð, sum nú verður avloyst av hesi nýggju kunngerðini. Heitið ÚSUN stendur fyri »útbúgvingarstuðul til lesandi uttan fyri Norðurlond«. Orsøkin til, at tað er tørvur á eini serligari skipan á hesum øki, er, at í flestu londum uttan fyri Norðurlond verður skúlagjald kravt. Uml. 90% av føroyingunum, ið lesa uttan fyri Norðurlond, eru í ES-londum, og er skúlagjaldið fyri ein, ið ikki er ES-borgari, nógv hægri enn fyri ES-borgarar. Flestu føroyingar – uml. 40 av teimum uml. 50 lesandi – lesa í dag í Stóra Bretlandi. Skúlagjaldsupphæddin har er 3-10 ferðir so høg fyri ein føroying, sum fyri ein ES-borgara. Upphæddirnar eru ymiskar á útbúgvingarstøðunum, og eisini er skúlagjaldskostnaðurin ymiskur á teimum ymisku útbúgvingunum, men í dag liggja upphæddirnar vanliga millum kr. 50.000 og kr. 110.000 árliga. Seinnu árini eru prísirnir hækkaðir, eisini orsakað av at £'ið er styrknað.

Ein av høvuðsbroytingunum í hesi nýggju kunngerðini er hækkingin av upphæddini, ið Stuðulsstovnurin í mesta lagi kann veita tí lesandi til skúlagjald – hon fer úr kr. 60.000 til kr. 120.000 um árið. Viðmerkjast skal, at sum áður er møguleiki at læna til skúlagjaldið frá Stuðulsstovninum, um gjaldið er hægri enn tað, ið kann latast í studningi. Orsøkin til at stuðulin verður hækkaður er, at ein størri og størri partur av teimum lesandi gjalda skúlagjøld, ið liggja væl oman fyri gomlu upphæddina. Um stuðulin ikki verður hækkaður, er vandi fyri, at færri og færri fara at lesa uttan fyri Norðurland, og er hetta í stríð við ein av málsetningunum hjá núverandi landsstýri. Vandi hevði eisini verið fyri at lesandi fóru at velja útbúgvingarstøð í ov stóran mun eftir, hvør prísurin var, heldur enn eftir góðsku.

Av øðrum broytingum í kunngerðini kunnu nevnast:

• Neyvari er ásett, hvørjir útbúgvingarbólkar kunnu fáa stuðul. Talan er um hægri útbúgvingar og um støðislestur eftir miðnámsútbúgving (foundations studies), um hetta er ein fortreyt fyri upptøku til hægri lestur. Harafturat verður møguleiki at veita stuðul til skiftislestur á hægri útbúgvingum undir ávísum treytum.

• Ásett er eisini, hvussu leingi stuðulin kann veitast – í mesta lagi 6 ár, tó ongantíð meira enn eitt ár út yvir ásettu lestrartíðina. Talan er um somu meginreglu sum hjá føroyingum, ið lesa í Føroyum, Danmark og í hinum Norðurlondunum.

• Lesandi fáa í dag stuðul til livikostnað í 4 ár frá Statens Uddannelsesstøtte. Hetta hava tey rætt til sum danskir ríkisborgarar. Um lesturin er longri enn tey 4 árini, ella um tann lesandi ikki hevur danskan ríkisborgaraskap, men uppfyllir kravið um tilknýtið til Føroya, hevur Stuðulsstovnurin veitt stuðulin til livikostnað. Henda upphædd hevur higartil verið kr. 3.000 um mánaðin. Frá 1. august verður upphæddin altíð tann sama sum upphæddin, ið verður veitt til hægri lestur í Føroyum. Upphæddin verður árliga prístalsvíðgjørd og er í dag kr. 3.308 í studningi um mánaðin. Tann lesandi fær eisini møguleika at taka lestarlán, sum í dag í mesta lagi er kr. 2.098 um mánaðin.

• Ásetingin í tí gomlu kunngerðini um, hvussu tilknýtið hjá lesandi til Føroyar skal vera fyri at hava rætt til at fáa ÚSUN-stuðul, hevur fleiri ferðir verið umrødd bæði í tinginum og í bløðunum. Hendan ásetingin er nú broytt og gjørd greiðari.

Víst verður annars til heimasíðuna hjá Stuðulsstovninum www.studulsstovnurin.fo, har nýggja kunngerðin er at finna. Síðst í hesum mánaðinum verða nýtt umsóknarblað og vegleiðing til nýggju ÚSUN-kunngerðina løgd út á heimasíðuna. Inntil tá kann tað gamla umsóknarblaðið nýtast.

Eyðun Mohr Hansen settur sum deildarstjóri

TÍÐINDASKRIV

Almanna- og heilsumálastýrið hevur sett Eyðun Mohr Hansen, Tórshavn, í starv sum deildarstjóri á Almannadeildini í Almanna- og heilsumálastýrinum.

Eyðun Mohr Hansen er útbúgvin sum cand.scient.pol. frá lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Eftir lokna útbúgving, hevur hann starvast sum fulltrúi í Ríkisrevisiónini í fýra ár og tað seinasta árið sum fulltrúi í »Kort og Matrikelstyrelsen«.

Eyðun Mohr Hansen byrjar í starvinum tann 1. juni 2002.